## Avkastið bjargaði roknskapinum

Seinastu mongu árini hevur fótbóltsfelagið B36 lagt ein roknskap við trivaligum yvirskoti til góðkenningar fyri limir sínar.

Hesaferð var talan í so máta um eitt undantak, tí raksturin hjá felagnum gav eitt hall upp á 55 tkr. Yvirskotið seinastu árini hevur tó havt við sær, at felagið hevur havt stórar peningaupphæddir innistandandi, og avkastið av hesum var í fjør rættiliga gott.

Netto góvu rentuinntøkurnar 180 tkr., og tí kundi kassameistarin, Kjartan Mohr staðfesta, at botnlinjan á roknskapinum gav eitt yvirskot á 126 tkr.

Eginpeningur felagins er nú 5.025 tkr., og tøki peningurin er 2.052 tkr.

-jm

## Kjartan nýggjur formaður

Tað varð ikki nakað ókunnugmaður, sum loysti Kristian á Neystabø av í formanssessinum hjá B36. Kjartan Mohr varð fyrstu ferð valdur í nevndina í 1986, og síðani tá hevur hann virkað sum kassameistari. Nú verður hann so formaður í felagnum, sum hann eisini umboðaði sum leikari. Afturat honum er nevndin soleiðis samansett: Símun Midjord, næstformaður, Maiken Poulsen, kassameistari, Hannis Egholm, skrivari og Judith Eysturoy, nevndarlimur.

Tiltakslimir eru Tummas Eli Hansen og Ruben Andresen.

-jm

## Afrikani skal royna seg

Í B36 halda tey seg vera um at hava leikarahópin til komandi kappingarár til reiðar. Leingi hava ætlanir tó verið um at styrkja álopspartin á liðnum.

Týsdagin verður ein roynd gjørd at bøta um hetta, tá ein 25 ára gamal suðurafrikanskur leikari kemur at royna seg. Hesin eitur Obele Okeke Onyebuchi, og hevur undan føroyaferðini roynt seg í jugoslaviskum fótbólti, umframt at hann seinastu árini hevur spælt við Syrienska, sum spælir í næstbestu svensku deildini.

-jm

# Føðingardagurin gav undirskot

**Mánakvøldið hevði HB aðalfund, og roknskapurin fyri 2004 vísti eitt lítið undirskot, men tí var roknað við frammanundan**



*Birgir Enghamar, formaður í HB, er nøgdur við úrslitið fyri 2004, hóast roknskapurin vísti eitt hall upp á góðar 100.000 krónur. Hann vísir á, at felagið hevði roknað við einum halli orsaka av teimum mongu útreiðslunum í sambandi við 100-ára dagin*

*savnsmynd*

AÐALFUNDUR

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Í hesum døgum hava fleiri av fótbóltsfeløgunum kring landið aðalfund, og mánakvøldið høvdu greipuvinnararnir úr HB sín regluliga aðalfund. Ikki óvæntað var eitt lítið undirskot á roknskapinum, sum skyldast hátíðarhaldinum í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá felagnum í fjør.

### Eru nøgdir

Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, sigur, at í HB eru tey tó væl nøgd við úrslitið, tí tey høvdu roknað við einum undirskoti í sambandi við føðingardagin.

– Nú hevði móðurfelagið undirskot upp á góðar 100.000 krónur, men hinvegin hevði partafelagið Havnar Fótbóltur, sum rekur 1. deildarliðið, og eisini hevði aðalfund mánakvøldið, yvirskot, og leggja vit úrslitini hjá hesum báðum og HB-stuðlum í ein pott, so gevur tað tilsamans eitt yvirskot, sigur Birgir Enghamar.

Ein lítil útskifting var eisini í nevndini í HB. Kassameistari felagsins seinnu árini, Petur Ove Johannesen, takkaði fyri seg eftir lokna tænastu, og í hansara stað varð valdur Teitur Johannesen, sum hevur verið tiltakslimur frammanundan. Hin tiltakslimurin í nevndini, Sámal Hansen, fór eisini frá, tí hann fer í annað álitisstarv í felagnum, sigur Birgir Enghamar.

Í staðin fyri teir báðar vóru vald Bjørg Joensen og Helgi Nielsen.

### Nýtt búmerki

Á aðalfundinum legði trúfasti skrivarin hjá HB, Marni Mortensen, eisini fram eitt uppskot um nýtt búmerki til felagið. HB hevur í mong ár havt eitt búmerki, sum eingin kennir søguna hjá, men í fjør var so gjørt eitt serligt 100-ára jubileumsbúmerki.

Felagið metti, at rættast var at gera eitt uppskot til eitt nýtt búmerki, og tað hevur Marni Mortensen so tilevnað. Síðani hevur Team 85 reinteknað merkið, og mánakvøldið var uppskotið so lagt fyri aðalfundin.

Fundurin tók væl undir við nýggja búmerkinum, sum bleiv einmælt samtykt. Nýggja búmerkið ímyndir Tórs hamar í einum reyðum og svørtum ringi, har tað stendur HB og 1904.

Sum áðurnevnt hevði partafelagið Havnar Fótbóltur eisini aðalfund mánakvøldið, og har vóru tveir av nevndarlimunum útskiftir. Høgni Mikkelsen og Jan Gaard Joensen takkaðu fyri seg, og tí teirra stað vóru valdir Bjarni Kyster og Hallur Danielsen.




*Nýggja búmerkið hjá Havnar Bóltfelag, sum Marni Mortensen hevur teknað, og sum aðalfundurin hjá felagnum góðkendi mánakvøldið.*

*Mynd: www.hb.fo*

# Minstukrøvini komin frá feløgunum

**Týsdagin var evstamark hjá fótbóltsfeløgunum fyri at lata inn minstukrøvini til Fótbóltssamband Føroya**

MINSTUKRØV

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fótbóltsfeløgini kring landið hava í seinastuni havt úr at gera við at fyrireika seg til at lata minstukrøvini inn til FSF. Í ár er fyrstu ferð, at feløgini, ið hava sítt besta lið í 2. deild, skulu lata minstukrøvini inn.

### Gingið gott

Fríði Nielsen, varaaðalskrivari í Fótbóltssambandinum, sigur, at tað hevur gingið gott við at fáa tilfarið sendandi frá feløgunum.

– Vit hava brúkt eitt sindur av tíð upp á at vegleiða serliga 2. deildarfeløgini, tí tey ikki hava royndt hetta áður, men tað hevur gingið gott, sigur Fríði Nielsen.

Hann greiðir frá, at FSF hevur allatíðina havt ein følara úti hjá feløgunum fyri at vita, hvussu tað hevur gingið, og somuleiðis hevur Fótbóltssambandið havt ein kontaktpersón í teimum einstøku feløgunum, ið hevur havt ábyrgdina av júst hesum málsøki í tí einstaka felagnum.

Eftir at alt tilfarið um minstukrøvini var komið FSF í hendi týsdagin, hevði umsitingin hjá Fótbóltssambandinum tríggjar vikur at fara ígjøgnum tilfarið í, áðrenn tað verður lagt fyri loyvisnevndina hjá FSF, sum skal endaliga gera av, um tey einstøku feløgini lúka minstukrøvini, og harvið fáa loyvi til at taka lut í landskappingini í fótbólti 2005.

Loyvisnevndin hjá FSF hevur fund 14 mars, og tá fer nevndin at taka endaligu avgerðirnar, um feløgini lúka krøvini.

i Sosialurin